# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Leivur á Torkilsheyggi 50 ár



Í dag, mikudagin 14. juni, verður Leivur á Torkilsheyggi á Nesi í Eysturoy 50 ár. Leivur er bóndi, og hann hevur nógvu tey seinastu árini havt vøruflutning við lastbili.

Leivur er ættaður av Torkilsheyggi. Foreldrini vóru Olivia fødd Petersen og ættað úr Rituvík, og Kissa Thorkildshøj. Kissa sat við hálvum Náðisgarðinum, og so ansaði hann fýrin á Garðsenda á Toftum. Leivur tók báðar uppgávurnar eftir pápan, og hann hevur eisini ábyrgdina av vitanum á Flesjunum.

Olivia og Kissa fingu sjey børn. Fyrst fimm gentur og síðani tveir dreingir: Bettemi, Tóra, Guðrun, Karin, Eydna, Símun Pætur og Leivur. Bettemi, Karin og Eydna búgva í Runavík. Tóra og Guðrun búgva á Toftum, Símun Pætur býr í Kristnastovu í Keypmannahavn, og Leivur býr á Nesi, har hann hevur bygt við síðuna av barnaheiminum.

Eftir skúlatíðina royndi Leivur eitt sindur av hvørjum. Hann sigldi við Skipafelagnum, var á skrivstovuni hjá Lynfrost í Runavík, koyrdi Shell oljubil og eitt stutt skifti arbeiddi hann hjá verfaðirinum, Ólavi Gregersen, sála, sum hevði Tøtingarvirkið.. Miðskeiðis í áttati árunum fekk Leivur sær lastbil, og síðani hevur hann á fyrimyndarligan hátt rikið sína egnu fyritøku.

Leivur er røkin, álitisfullur, trúfastur og fyrikomandi. Hann er altíð við tí góða orðinum, og tað liggur væl fyri hjá honum at skemta.

Í 1980 giftist Leivur Elini Gregersen úr Syðrugøtu. Tey eiga fýra børn: Óli Kristian (1981), Erla (1983), Beinta (1987) og Óluva (1992). Heimið er fyrimyndarligt og gestablídnið er stórt.

Tað liggur væl fyri hjá Leivi at bóndast. Honum og familjuni dáma væl at vera í Húshaganum, í Rituvík og yviri í Nevinum, og tey ganga høgt upp í seyðahaldið.

Leivur er altíð í sving. Tá ið ein fríløta er, dámar honum væl at fáast við sang og tónleik. Hann spældi bass og sang í Midnáttarsangbólkinum, sum var nógv frammi í sjeyti árunum, tá tey eisini góvu tvey bond út. Hann er trúgvur í samkomuni Nebo, har hann plagar at hjálpa til við sangi og musikki, og seinastu árini hevur hann verið ein av teimum, sum hava lagt nógva orku í at byggja samkomuni í Nebo nýggjan sal.

50 ára føðingardagin er opið hús á Torkilsheyggi.

**J**

## Andlát og jarðarferðir

Jarðarferðin hjá **Thorvaldi M. Poulsen** verður hósdagin kl. 13 úr Tvøroyrar kirkju. Tey, ið vilja minnast Thorvald, kunnu lata Hjartafelagnum eina peningagávu. Konta í peningastovunum.

**Mina Olsen** úr **Vági**, búsitandi í Tórshavn, andaðist í heiminum mánadagin, 82 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin kl. 13.

**Louis Sigfred Andreasen, Eiði**, andaðist mánadagin 12. juni á Landssjúkrahúsinum, 85 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum mikudagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Eiðis kirkju fríggjadagin klokkan 14.

**Lindi Gardar, Klaksvík** andaðist mánadagin 12. juni í Sambýlinum á Heygnum, 69 ára gamal.

**Jóhanna Olsen**, ættað úr **Oyndafirði** búsitandi í **Havnsø** Danmark, andaðist leygardagin, 68 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Stig Bjergby kirkju hósdagin kl. 13.

**Jonhard Vang Jacobsen úr Syðrugøtu** andaðist á Ríkissjúkrahúsinum leygardagin, 70 ára gamal

**Dagurin í morgin**

**15. juni. Valdemarsdagur.** Danski kongurin Valdemar Sigur vann í orrustuni við Reval í Estlandi 1219. Søgnin sigur, at tá illa stóð til, fell reyður dúkur við hvítum krossi niður av himni. 15. juni í 1912 varð kunngjørt, at hesin dagurin skuldi vera almennur danskur flaggdagur til minnis um sigurin við Reval. Navnið Valdemar er eftir russiska Vladimir, ið merkir mikil í sínum veldi.

# Hjálmur er cool




*Týsdagin byrjaði árliga Kiwanis útberingin av súkkluhjálmum til næmingarnar í 1. flokki. - Vit eru stuðlunum sera takksom, tí uttan teirra stuðul, var hetta tiltakið ikki møguligt, sigur Rúna Sivertsen, formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd*

*Mynd: Ferðslutrygd*

**Í hesum døgum fáa øll børn, sum ganga í 1. flokki í Føroyum, hvør sín súkkluhjálm. Tað er felagsskapurin Kiwanis, sum fyri nøkrum árum síðani tók stig til hetta tiltakið**

FERÐSLUTRYGD

Aftur í ár fáa øll børn, sum ganga í fyrsta flokki súkkluhjálm sum gávu. Tað er felagsskapurin Kiwanis, sum fyri nøkrum árum síðani tók stig til hetta tiltakið, sum verður stuðlað av Føroya Sparikassa, MBM og Skipafelagnum.

Nú er summar og besta súkklutíð, og at súkkla er bæði sunt og stuttligt. Men tað er ikki vandaleyst. Serliga er tað høvdið, sum stendur fyri skotum, um illa vil til.

Tí er umráðandi, at børn eru í hjálmi, tá ið tey súkkla, standa á rulluskoytum, rullufjøl og tílíkum.

– Vit eru stuðlunum sera takksom, tí uttan teirra stuðul, var hetta tiltakið ikki møguligt, sigur Rúna Sivertsen, formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin